# Grækaris-messuhald í Fuglafirði

Í morgin er grækarismessa, og fara skótarnir í Fuglafirði at skipa fyri grækarismessuhaldi á Bugnum við Bókasavnið/Kunningarstovuna í Fuglafirði.

Emil Olsen, prestur, flytir fram røðu, Fuglafjarðar Hornorkestur spælir vártónleik og skótarnir ganga skrúðgongu frá skótahúsunum oman á Bug.

Eftir grækarismessuhaldið bjóða skótarnir til súpan í skótahúsunum.

# Yvirskot á 645 mió

Kaupthing Bank samtakið hevði í 2003 eitt yvirskot svarandi til 645 milliónir føroyskar krónir eftir skatt. Talan er um ein vøkstur á 40% í mun til 2002.

Samlaðu fíggjarinntøkurnar vóru 2.729 milliónir kr., meðan samlaði kostnaðurin var 1.588 milliónir kr.

Fíggjarstøðan hjá Kaupthing Bank javnvigaði við 47,9 milliardum kr. Harav eru latin lán til viðskiftafólk fyri 30,1 milliard kr. Samlaðu avsetingarnar móti tapum vóru 334 milliónir kr í 2003.

Eginpeningurin við árslok var 3.949 milliónir kr. og solvensurin hjá Kaupthing Bank er 14,2%.

Nevndin í bankanum fer at skjóta upp fyri aðalfundinum at rinda 113 milliónir í vinningsbýti - svarandi til 18% av yvirskotinum.

Úrslitið fyri 2003 er gott og fjórði ársfjórðingur var tann besti í allari søguni hjá bankanum. Styrkin av sparingunum í sambandi við samanleggingina millum Kaupthing og Búnaðarbankann hava víst seg skjótari enn væntað. Harumframt er virksemið uttanfyri Ísland nú veruliga byrja at kasta av sær.

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F almannakunngerð í næstu viku úrslitið fyri virksemi í Føroyum.

# Sølustevna á Tvøroyri

Aftur í ár skipa Tvøroyrar Bóltfelag og Tvøroyrar Svimjifelag fyri eini Páskasølustenu. Í ár er hon eftir Páskir. Sølustevnan verður 29. og 30. apríl, 01. og 02. mai 2004. Stevnan hevur til endamáls at kunna føroyingum um tað fjølmenta úrvalið av vørum og tænastum, sum handlar og virkir kring alt landið hava at bjóða.

Stevna skal í sær sjálvari hava eitt fjølbroytt úrval av vørum til tey vitjandi. Men endamálið er eisini at geva teimum luttakandi møguleikan at kunna seg um vøruúrvalið og samstarvsmøguleikar í Føroyum.

Sum nakað afturgangandi á hesi stevnu verður tað skipað fyri undirhaldi fyri teimum vitjandi og veitslu o.a. fyri luttakarar.

– Vit fara hervið at bjóða øllum vælkomnum til Trongisvágs á sølustevnu og fara somuleiðis at loyva okkum at ringja til tykkara fyri at vita, um tit hava áhuga at luttaka, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Tey vitjandi á stevnuni hava møguleikan at velja ein bás ímillum teir 35 básarnir til at vera tann besti ella vakrasti básurin. Vinningur verður latin til vinnandi básinum.

# Nýtt bensin

– Eftir at nýtt blýfrítt bensin oktan 95 kom til landið við tangaskipinum »Magn« í farnu viku, eru vit í dag farin undir at selja hetta á flestu Shell støðunum kring landið.

Hetta sigur Shell í tíðindaskrivi. Felagið vísir á, at flest allir bensinbilar nýta blýfrítt oktan 95. – Allir bilar, sum eru framleiddir eftir 1990, kunnu nýta blýfrítt oktan 95. Tað er sostatt bert ein minni partur av bensindrivnu bilunum í Føroyum, ið framhaldandi noyðast at nýta oktan 98, sigurt oljufelagið Shell.

Eru ivamál ella spurningar um ein bilur kann nýta oktan 95, so mæla tey á Shell til, at spurt verður um hetta hjá teimum ávísu bilforhandlararunum. Ofta ber eisini til at kanna hesi viðurskiftir í instruktiónsbókini, sum hoyrir til bilin.

Hendan umlegging sparir oljufelagnum pengar, tí tey fáa keypt bensinið inn bíligari – og verður prísurin fyri brúkaran tilsvarandi lækkaður, sigur Shell.

Shell fer framhaldandi at selja oktan 98 á mestsum øllum støðunum í Føroyum.

# Bók um beningar

BÓKAÚTGÁVA
*Forlagið Sprotin*




So kanst tú lættliga loysa gáturnar nú, tí nýggj føroysk bendingarlæra er komin á marknaðin.

Ein fitt og snotilig bendingarlæra, sum Jeffrei Henriksen hevur lagt til rættis og útgivið á Sprotanum.

Bókin er vælegnað sum leitorðabók hjá lærarum, næmingum, fjølmiðlafólki, skrivstovufólki og øllum, sum onkuntíð ivast í, hvussu føroysk orð verða bend.

Til ber at finna bendingar og stavsetingar av flestu føroysku orðum í bókini. Bókin er skipað við alfabetiskum orðalista við upplýsingum um orðaflokk, og hvar bendingin er at finna.

# Jensens Bøfhus í Havn




Innan ikki alt ov langa tíð verður helst møguligt hjá føroyingum at fara á Jensens Bøfhus. Og hetta kann tá gerast í Føroyum væl at merkja.

Tað hevur hevur í longri tíð verið arbeitt við at fáa eina føroyska deild av væl umtóktu donsku matstovuketuni, og nú røkist fyri, at allir smálutir hesum viðvíkjandi eru nú mest sum komnir upp á pláss.

Sum skilst, so er tað P/F Bowling, sum eigur og rekur Bowling-høllina í Havn, sum fer at reka nýggja matstovustaðið. Bjarni Kyster, sum er stjóri í felagnum, sigur seg í løtuni ikki vilja gera nakrar viðmerkingar til tíðindini, men sum Sosialurin hevur skilt støðuna, so gongur tað helst ikki long tíð, áðrenn avtalan verður endaliga staðfest.

**-jm**



# Óðalsmentan í Pakkhúsinum

**Fyrilestur verður í Vági í kvøld um óðalsmentan**

ÓÐALSMENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Stóra Pakkhús í Vági hýsir tiltøkum av ymsum slag, so okkurt er til tey flestu, og húsið er í kvøld, 11. mars, karmur um áhugaverdan fyrilestur. Tað er Óðalsfelag Føroya, ið skipar fyri fyrilestrinum, sum hevur heitið Óðalmentan í Føroyum. Kári á Rógvu, løgfrøðingur, umboðar felagið og heldur fyrilesturin.

Fyrilesturin verður í Stóra Pakkhúsi klokkan 19 í kvøld og øll við áhuga fyri evninum er vælkomin.

# Aðalráð og stovnar fylgja vegleiðing um nýtslu

**Alt bendir á, at aðalráð og almennir stovnar halda seg til vegleiðingina um játtanarnýtslu, nú ein bráfeingisfíggjarlóg er í gildi. Tí er ósakligt at mála eina mynd, sum vísir, at almenna nýtslan er ótálmað, heldur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Bárður Nielsen**



*Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

FÍGGJARLÓG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Ferð er á arbeiðinum at smíða eina fíggjarlóg fyri 2004. Síðani samgongan varð skipað, er arbeitt við málinum, og landsstýrið roknar við, at politiska viðgerðin av fíggjarlógaruppskotinum verður liðug hósdagin í hesi vikuni.

Hetta sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálukm.

– Hereftir verða allar kreftir brúktar til at gera uppskotið klárt at leggja fyri Tingið, sigur landsstýrismaðurin, sum eisini upplýsir, at arbeiðið við fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 byrjar beint eftir, at Løgtingið hevur fingið fíggjarlógaruppskotið fyri í ár.

Fíggjarlógin fyri 2004 kemur í staðin fyri eina bráfeingis fíggjarlóg, sum kom í gildi, tí løgtingsval varð útskrivað, áðrenn nøkur fíggjarlóg varð samtykt.

Í desember 2003 fingu aðalráðini eina vegleiðing um játtanarnýtslu at halda seg til. Meginreglan í hesi vegleiðing er, at meðan bráfeingis fíggjarlógin er í gildi, má einki nýtt virksemi setast í gongd. Hinvegin kunnu neyðugar útreiðslur gjaldast, til at landshúsahaldið ótarnað kann halda fram, og átiknar skyldur kunnu haldast.

Fyri at tryggja, at vegleiðingin um játtanarnýtslu verður hildin, hevur landsstýrismaðurin sent aðalráðunum áminning um at verða afturhaldin við nýtsluni og einans halda neyðugar útreiðslur. Í einstøkum førum hava ivamál verið, men annars er einki, sum bendir á, at vegleiðingin um játtanarnýtslu ikki verður fylgd.

– Tí sýnir tað ósakligheit og ábyrgdarloysi, tá ein politikari roynir at mála eina mynd, sum vísir, at almenna nýtslan er ótálmað. Tann myndin er ósonn og er helst ætlað at sáa iva um trúvirðið hjá Fíggjarmálaráðnum og búskaparligu stýringini av landinum, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Hann sipar til tingmannin, Høgna Hoydal, sum alment hevur úttalað, at pengar fossa úr landskassanum.

– Hald er sjálvsagt ikki í tí úttalilsinum, sigur landsstýrismaðurin.



VIDMERKINGAR

Peningur fossar úr landskassanum

*Tað var í einum lesarabrævi týsdagin, at Høgni Hoydal segði, at pengar fossa úr landskassanum. Hesum vísir Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, greitt aftur*



# Endurgjaldið strikast

**Vinnumálaráðið arbeiðir við einum uppskoti um at strika endurgjaldið til tær havnir, har skipini hjá Strandferðsluni gevast at sigla. Uppskotið, sum rakar Tvøroyri, Leirvík og Klaksvík, fer at spara landinum upp til 16,2 milliónir krónur.**

ENDURGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*– Tað er bæði av prinsipiellum orsøkum og fyri at spara pengar, at ætlanin er at strika endurgjaldið til kommunur, tá ein sjóvegis farleið verður flutt ella niðurløgd, sigur Bjarni Djurholm, ið væntar at spara upp til 16,1 milliónir krónur*

Skal ein kommuna hava endurgjald, tá ein sjóvegis farleið hjá Strandferðsluni verður flutt ella niðurløgd?

Nei, heldur Vinnumálaráðið, ið arbeiðir fyri at strika endurgjaldið til kommunurnar, ið svarar til havnagjaldið í fimm ár, grundað á miðalgjaldið trý tey seinastu árini. Málið var fyri á landsstýrisfundi týsdagin, og verður nú sent út til kommunurnar til hoyringar.

- Talan er um bæði ein prinsipiellan og peningaligan spurning. Ein kann spyrja, um tað er rætt, at tað almenna, sum í síni tíð rindaði størsta partin av havnum til strandfaraskip, nú eisini skal veita endurgjald, tá farleiðir verða niðurlagdar. Harumframt er talan um, at tað almenna skal spara pengar, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Tøl hjá Vinnumálaráðnum vísa, at í flestu førum hevur landið rindað millum 60 og 80 prosent av kostnaðinum, tá havnir eru gjørdar til skipini hjá Strandferðsluni. Í dag er mannagongdin broytt, so landið í flestu førum ger sínar egnu havnir og ber allan kostnaðin. Dømi um hetta eru samferðsluhavnirnar á Drelnesi og á Syðradali.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir á, at broytingar í flestu førum verða framdar, tí okkurt betur kemur í staðin.

– Siglingin til hesar havnir heldur uppat, tí nýggjar havnir verða bygdar ella tí at fast samband kemur í staðin, sigur Bjarni Djurholm og spyr, um tað tí er rímiligt, at tað almenna harumframt skal veita endurgjald.

## Sparingar

Vinnumálaráðið hevur roknað seg fram til, at við uppskotinum kann tað almenna spara upp til 16,1 milliónir krónur. At tað ikki ber til at siga heilt neyvt, hvussu stór sparingin verður, kemst av, at Tvøroyar Kommuna hevur stevnt Strandferðsluni eftir hægri endurgjaldi enn tí, sum kommunan í dag stendur til at fáa. Harumframt hevur Vestmanna Kommuna stevnt Strandferðsluni eftir hægri endurgjaldi, men har er støðan eitt sindur øðrvísi, tí kommunan fær undir øllum umstøðum endurgjald, tí farleiðin um Vestmannasund sum kunnugt er niðurløgd.

Verður uppskotið hjá Vinnumálaráðnum samtykt, fer tað at raka Tvøroyri, Leirvík og Klaksvík, ið ikki fara at fáa endurgjald, tá sjóvegis farleiðirnar til hesi pláss ávíkavist verða flutt og niðurløgd.

## Hevur skund

Bjarni Djurholm sigur, at letur tað seg gera, so verður uppskotið lagt fyri løgtingið í hesi tingsetu. Og somuleiðis hevur uppskotið um at strika endurgjaldið til kommunurnar verið við í arbeiðnum hjá samgonguni at smíða fíggjarlógina fyri 2004.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir tó á, at fyrst skal uppskotið til hoyringar hjá kommununum.

# Samskip sigla á Klaksvík

FLUTNINGUR

Íslendska flutningsfelagið Samskip fer í framtíðini at leggja at í Klaksvís á veg úr Íslandi til Immingham í Stórabretlandi. Farmaleiðir hjá Strandferðsluni hevur í hesum sambandi fingið avtalu um skipaavgreiðslu og flutning í Føroyum.

1. apríl verður ein nýggjur møguleiki hjá útflytarum at fáa sína vøru á bretska og evropeiska marknaðin. Tá fer farmaskipið Skaftafelli hjá íslendsku flutningsfyritøkuni Samskip at leggja at í Klaksvík, á veg av Reyðafirði í Íslandi til Immingham í Bretlandi. Í fyrstu atløgu verður siglt á Klaksvík 14. hvønn dag.

Í hesum sambandi hevur Farmaleiðir hjá Strandferðsluni fingið í lag avtalu við íslendska reiðaríið. Farmaleiðir skal avgreiða allan farmin hjá Samskip í Klaksvík, og harumframt skulu Farmaleiðir taka sær av flutningi til og úr Klaksvík.

- Hetta kemur væl við, sigur Heini á Borg, leiðari á Farmaleiðum, og vísir á, at flutningurin hjá teimum annars er minkandi.

Heini á Borg dugir tó ikki at siga, hvussu stóran týdning avtalan hevur fyri Farmaleiðir. Tað veldst um, hvussu nógvan farm, talan verður um at avgreiða.

Fyri Farmaleiðir verður ikki talan um at gera nakra íløgu afturat í Klaksvík. Fyritøkan fær ein stóran trukk, ið kann lyfta konteynarar, frá Samskip, og í fyrstu atløgu kunnu verandi starvsfólk hjá Farmaleiðum í Klaksvík røkja hesa uppgávuna afturat.

Skaftafelli er bygdur í 1997. Skipið er 120 metrar langt, stingur 6,4 metrar og lastar 364 20-fóts konteynarar.

Áramál er ikki sett á avtaluna millum Samskip og Farmaleiðir, tí enn er ov tíðliga at siga, hvørt farleiðin fer at bera seg í framtíðini. Í næstum fer Samskip at seta eitt sølufólk í Føroyum.

**JBH**

# Rúsan flytur ikki

RÚSDREKKASØLA

- Einki hald er í leysasøgunum um at deildin í Runavík skal flyta í onnur høli, og minkandi sølan ger hølistrupulleikan minni átrokandi, sigur Dagmar Joensen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins.

Minkandi ferðin á samfelagshjólunum ger hølistrupulleikarnar hjá Rúsdrekkasølu Landsins í Eysturoynni minni átrokandi.

Í fleiri ár hevur Rúsan leitað eftir betri hølum til deildina í Eysturoynni. Serliga eru tað parkeringsviðurskiftini og atkomumøguleikarnir annars, sum ikki eru nøktandi í deildini í Runavík. Rúsdrekkasølan hevur fingið bjóðað fleiri høli í Eysturoynni, og eisini hava samráðingar verið við útleigarar.

- Fyri tveimum árum síðani vóru trupulleikarnir átrokandi. Men nú er minni virksemi, og sølan er minkandi, sigur Dagmar Joensen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins.

Í fjør minkaði sølan hjá Rúsdrekkasølu Landsins við trimum prosentum, sammett við árið fyri, og higartil í ár hevur gongdin verið tann sama. Minni verður selt. Tí hava ætlanirnar um at flyta í onnur høli lægri raðfesting í dag enn fyri fáum árum síðan.

- Seinastu tvey árini hava ongar samráðingar verið, og í løtuni eru ongar ætlanir um at flyta deildina í Eysturoynni, sigur Dagmar Joensen.

**JBH**

Kommunur:

# Góðtaka ikki at missa endurgjaldið

**Kommunurnar báðu megin sjóvegis farleiðina um Leirvíksfjørð halda lítið um uppskotið hjá Vinnumálaráðnum um at strika endurgjaldið, tá Strandferðslan gevst at sigla**

ENDURGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tað kom óvart á hjá Klaksvíkar og Leirvíkar Kommunu, at Vinnumálaráðið ætlar at strika endurgjaldið fyri mist havnagjald, ið kommunurnar høvdu roknað við at fáa, tá sjóvegis farleiðin um Leirvíksfjørð verður niðurløgd í samband við at koyrandi verður undir fjørðin.

Sambært galdandi reglum eiga kommunurnar endurgjald, ið svarar til havnagjaldið í fimm ár, grundað á miðalgjaldið trý tey seinastu árini.

Leirvíkar Kommuna fær í ár 780.000 krónur í havnagjaldi fyri skipini hjá Strandferðsluni, og hevur rætt til millum tríggjar og fýra milliónir krónur í endurgjaldi, tá siglingin um Leirvíksfjørð verður niðurløgd.

- Vit hava roknað við hesum endurgjaldinum, og tískil kemur hetta sera óvart á, sigur Sjúrður Eliasen, borgarstjóri í Leirvík.

Sjúrður Eliasen sigur, at hóast málið ikki enn ikki er viðgjørt í bygdaráðnum, so fer Leirvíkar Kommuna undir ongum umstøðum at góðtaka at missa endurgjaldið.

Eisini Thorleif Sigurðsson, varaborgarstjóri og formaður í havnanevndini í Klaksvík, heldur lítið um uppskotið hjá Vinnumálaráðnum.

- Aðrar kommunur hava fingið endurgjald, og tí meta vit okkum eisini hava rætt til endurgjaldið, sigur Thorleif Sigurðsson.

Sambært galdandi reglum hevur Klaksvíkar Kommuna rætt til millum fýra og fimm milliónir krónur í endurgjaldi.

Meðan eingin ferðsla verður um ferjuleguni í Leivík, tá fasta sambandið gerst veruleiki, er støðan eitt sindur øðrvísi í Klaksvík, vísir Thorleif Sigurðsson á. Tí tá ferjulegan á Syðradali verður liðug skal størri skip enn Barsskor væntandi røkja hesa farleið, og skal tí nýta ferjuleguna í Klaksvík.

- Men gjaldið, ið Klaksvík fær frá Strandferðsluni í samband við siglingina um Leirvíksfjørð, missir kommunan so, staðfestir Thorleif Sigurðsson.

## Vánaligar grundgevingar

Borgarstjórin í Leirvík, Sjúrður Eliasen, heldur lítið um grundgevingarnar fyri at strika endurgjaldið.

Hann vísir á, at Leirvíkar Kommuna hevur lagt millum 25 og 30 milliónir krónur í ferjuleguna í bygdini. Og harumframt var havnagjaldið fyrstu árini sera lágt, og als ikki nøktandi, sigur Sjúrður Eliasen.

- Og tað er burturvið at tosa um, at vit fáa ein undirsjóvartunnil í staðin fyri. Tað málið hevur einki við endurgjaldið at gera, og harumframt fær alt føroya fólk gleði av fasta sambandinum, sigur Sjúrður Eliasen.

Hvørki Klaksvíkar ella Leirvíkar kommuna hava enn viðgjørt málið, men tað verður gjørt í næstum. Eisini hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at málið verður sent kommununum til ummælis.